# Gransking vegurin fram

**Stjórin í Fiskaaling, Ingolf Joensen, sigur seg fegnast um, at gransking er sett á breddan í Føroyum, tí uttan gransking, verður trupult hjá okkum at bera tann førning, vit hava, longur fram á leið. - Tað er neyðugt, at vit byggja okkara framburð á vitan, tí vit hava lítlar møguleikar at kappast í framleiðslu við láglønarlond, sum kunnu framleiða okkum um koll, sigur hann**

FAROEXPO 07
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Ingolf Joensen hevur verið stjóri í P/F Fiskaaling síðan 1. november 2004. Aftrat sær hevur hann góð og dugnalig fólk við góðum førleikum til tað virksemi, sum felagið hevur í dag og hevur sett sær fyri at hava í framtíðini. Enn vantar felagnum tó nøkur fólk við ávísum førleikum, og stjórin kundi eisini hugsað sær, at tey høvdu meira pening at arbeiða við innan gransking, sum verður høvuðsmálið hjá felagnum í framtíðini.

- Við teirri fíggjarorku, vit hava, fara vit spakuliga til verka, men vit kundu væl hugsað okkum, at vit kundu sett enn meira ferð á hetta økið, sigur hann.

## Á annan bógv

Í nógv ár hevur ein av stóru, krevjandi og kostnaðarmiklu uppgávunum hjá Fiskaaling verið kynbótaarbeiði, men nú verður høvuðsdenturin lagdur á gransking og menning innan fisk og sjódýr, sum longu eru áhugaverd ella væntast at verða áhugaverd fyri føroysku alivinnuna.

Ingolf sigur, at Fiskaaling steðgaði við sjálvum kynbótaarbeiðnum við laksi í 2004, tí laksarogn nú kunnu flytast inn, samstundis sum raksturin av at framleiða rogn ikki er lønandi.

- Fyri at seta ferð á granskingarpartin, settu vit seinast í 2005 ein granskingarleiðara, Hannes Gislason, við granskaraútbúgving (PhD), og í fjør gjørdust uppaftur fleiri granskarar knýttir at felagnum, allir við førleika á PhD-stigi.



*Sjódepilin hjá Fiskaaling í Nesvík, har tey serliga fáast við tosk og kalva, sum eru lutfalsliga nýggj fiskasløg í føroyskum alihøpi*



*Poul Vestergaard við einum stórum og gýtingarførum toski av Føroyabanka. Toskayngul gongur nú á Árnafirði og í Hvalba*

## Fimm høvuðsøki

Stjórin vísir á, at Fiskaaling hevur sett sær fimm høvuðsøkir upp, sum granskast skal í frameftir.

Hesi eru 1) Aling av fiska-og djórasløgum, 2) Gen-og biotøkni, 3) Fóður, vatn og framleiðsluhættir, 4) Matvørugóðska og 5) Fiskaheilsa og aliumhvørvi.

- Hetta er ein stór og spennandi uppgáva, sum liggur fyri framman, og eg fegnist um øll tey góðu og dugnaligu fólkini, sum vit hava í felagnum.

Ingolf vísir á, at nú sjálvt kynbótaarbeiði er lagt á hilluna, hevur Fiskaaling fingið meira fíggjarliga "luft", sum hann tekur til, og hetta kemst av, at kynbótaarbeiði, sum gjørt er seinastu nógvu árini, hevur verið rættiliga krevjandi og kostnaðarmikil.

- Tað er eisini hugaligt at síggja, at vit aftur hava uppdrift í alivinnuni, leggur hann aftrat.

Stjórin sigur seg fegnast um, at gransking er sett á breddan í Føroyum, tí uttan gransking, verður trupult hjá okkum at bera tann førning, vit hava, longur fram á leið.

- Tað er neyðugt, at vit byggja okkara framburð á vitan, tí vit hava lítlar møguleikar at kappast í framleiðslu við láglønarlond, sum kunnu framleiða okkum um koll, sum hann tekur til.

## Vegurin fram

Ingolf vísir á, at gransking er ikki eitt øki, sum gevur sjónlig úrslit her og nú, men upp á sikt kann gransking koma at hava ein alt avgerandi vinnuligan týdning fyri okkum.

- Tað eru so mong dømir um, hvat kann spyrjast burtur úr gransking. Vit kunnu bara taka Danmark. Tá danir byrjaðu at granska í heilivági fyri kanska 30-40 árum síðan, vóru tað mong, sum ikki dugdu at síggjar møguleikar við hesum. Men hygg at heilivágsídnaðinum í Danmark í dag. Ein hópur av fyritøkum eru í landinum, sum hava ein veldugan útflutning, ið gevur dønum stórar inntøkur. Í dag eru danir frammarliga innan henda ídnað.

Hann vísir á, at tað er eingin patent-loysn upp á gransking sum heild, men tað vísir seg, at vitan hevur eina positiva "effekt", sum smittar av sær – ikki minst út í vinnuna, har nøkur av hesum fólkum seinni fara við síni vitan.

- Vit eru ikki teir fyrstu, sum skulu prógva, at hetta er so. Hetta er prógv-

## Søgan aftan fyri fiskaaling

P/F Fiskaaling varð stovnað í 1970, og Føroya Landsstýri eigur allan partapeningin í felagnum. Fyrstu uppgávurnar hjá felagnum vóru at menna framleiðslumannagongdir og at kanna hvørjir møguleikar vóru fyri lønandi aling í Føroyum.

Tíðliga í áttatiárunum, tá ið verulig gongd kom í framleiðsluna hjá privatum alarum, varð uppgávan hjá felagnum at fáa til vega nokk av dygdargóðum alitilfari sum rogn, yngul og smolt, og at geva alarum innlit í tann kunnleika, sum var uppbygdur í felagnum. Kynbótaarbeiði og sjúkuverja av alilaksi vórðu mettar sum týdningarmesta uppgávan, og hevur kynbóta-og miðvísa heilsuarbeiði eydnast væl.

Fyri at fjøltátta føroyska aling fór Fiskaaling í 1998 undir miðvísar royndir at ala kalva. Støð er bygd í Nesvík har møguleikar eru at gera royndir við aling av marinum fiskasløgum.

Í 2000 tók nevndin støðuna hjá Fiskaaling upp til nýggja viðgerð. Visjónin hjá Fiskaaling var at ganga á odda í granskingar- og menningarvirksemi innan alivinnuna í Føroyum. (-vilmund)

## Tætt tilknýti

Granskararnir, sum eru í starvi ella hava tilknýti til Fiskaaling, arbeiða og hava tætt tilknýti til stovnar í Danmark og í Noregi, og hetta gevur føroyska felagnum møguleika at hava tætt tilknýti til útlendskar granskingarstovnar. Arbeitt verður við at seta í gongd nýggjar PhD-verkætlanir og at knýta PhD lesandi til Fiskaaling.

(-vilmund)